# Morðið !!

"Skít!!" segði eg, tá ið eg enn einaferð teknaði uttan fyri eygað við tí nýggja eygnablýantinum. Eg hevði roynt í ein hálvan tíma at smyrja mær. Tað fór kortini ikki at rigga á mær. Eg fór altíð bara at vera tann gamla keðeliga Karin.

Tað bankaði á vesihurðina.

"Bíða!!" Skríggjaði eg. Eg royndi aftur at tekna eina striku… Men.. sum við teim síðstu 117 ferðunum, var strikan alt ov tjúkk.

Tað bankaði aftur á hurðina

"Alt í lagi!!" Rópti eg, og læt hurðina upp. Fríða kom inn. Hon helt fyri munnin, so eg ikki skuldi síggja, at hon flenti.

"Skalt tú í kríggj góða? Við hasi krígsmálingini?" skemtaði Fríða og fekk sær eina reyða varrastift.

"Tig við tær!" Svaraði eg ill aftur.

"Tú um tað… Eg og pápi tín fara út í býin at eta, so tú og J.P mugu faá tykkum okkurt úr kuldaskápinum."

Fríða er nýggja konan hjá pápa. Mamma mín doyði fyri 3 árum síðani.

Pápi kom saman við Fríðu fyri 1 ári síðani. 2 ár at koma yvir mammu. Fríða var virkuliga fitt og vøkur. Hon gekk altíð snøggum klæðum og var vakurt smurd.

Hon hevði verið ógvuliga skiljandi. Hon var bara ikki mamma.

Àja… J.P. stendur fyri Jóhan Petur, og hann er sonur Fríðu.

Hann var akkurát sum ein stóribeiggi fyri meg.

Hann er stórur og sterkur.

Hann er 16 ár og hevur gingið til kurvabólt í 10 ár. Hann hevur krúllut reytt hár og brún eygu.

Eg havi svart hár og næstan svørt eygu. Eg eri long og kløn, sum eitt kustaskaft.

"Ivaleyst," svaraði eg og fór út úr baðirúminum og inn í kamarið hjá mær.

Tað er ikki serliga stórt, men tað er ógvuliga hugnaligt. Vegginir eru reyðir, og songin hjá mær er hvít.

Eg tók eina hettutroyggju og lat meg í hana.

Eg fór út í gongina og lat meg í skógvar.

Eg læt hurðina upp og fór út á vegin. Ongin var har. Óivað tí at tað var so myrkt, sjálvt um klokkan bara var trý korter til átta.

Eg gekk við hondunum í lummunum á tí svørtu troyggjuni.

Knappliga fangaði okkurt mín áhuga.

Eg hugdi aftureftir. Ein ketta kom larmandi út frá eini lítlari gøtu.

Eg hugdi aftur frameftir og sá knappliga ein myrkan persón standa frammanfyri mær.

Eg visti ikki, um tað var ein maður ella ein kona. Tað líktist einum manni.

Hann stóð bara púra stillur. Gjørdi onki, stóð bara og hugdi at mær. Knappliga tók hann til hjartað.

"Hjálp mær..." teskaði hann og small um.

Eg skríggjaði. Blóðið byrjaði at flóta út á gangubreytina.

Fólk komu rennandi út á gongubreytina.

Pápi trokaði seg ígjøgnum mannamúgvuna til mín.

Eg var bleik sum eitt lík.

Pápi steðgaði beint við síðuna av mær.

Hann tók í armin á mær og dró meg inn til sín. Eg læt tárini renna oman kjálkarnar.

Eg hoyrdi sirenurnar á politibilinum.

Meira minnist eg ikki. Eg haldi, at eg svímaði.

Eg vaknaði seint morgunin eftir.

Eg haldi, at klokkan var 14.00... Ella okkurt sovorðið.

Eg hugdi runt í rúminum. Tað var ikki mítt kamar.

"Sjúkrahúsið" hugsaði eg.

Eg sá pápa sita og sova við síðuna av songini, eg lá í.

Hann vaknaði og hugdi uppá meg.

"Nú? Ert tú vaknað góða?" skemtaði hann og gapaði.

"Hvat hendi við hinum manninum?" spurdi eg. Eg tímdi ikki svara uppá eina so býttan spurning beint nú.

"Hann doyði, tá ið hann svímaði. Politiið segði, at hann bleiv skotin. Ongin veit, hvør skeyt hann, men tú skalt yvir á politistøðina at vitna" svaraði pápi og hugdi álvarsamur uppá meg.

Eg stardi bert út í luftina. Eg hugsaði ikki, bert stardi.

"Hvat minnist tú frá í gjárkvøldi?" spurdi ein tjúkkur, gráhærdur og eitt sindur lítil politistur.

"Altso... Ikki nógv... Bara at eg gekk hugsaði, og so knappliga stóð hann frammanfyri mær..." svaraði eg tónaleyst.

"Segði hann onki, ella gjørdi hann nakað?" spurdi politisturin.

"Jú... Han teskaði bara, "hjálp mær," haldi eg..."

"Okay... Takk fyri, vit eru liðug nú" segði hann og smíltist.

Eg reisti meg og fór út til pápa, sum stóð og bíðaði eftir mær.

Eg hevði væl tímað at vitað um, politiið nakrantíð fór at finna drápsmannin.

Tað fór tað helst... Men hvat nú, um hann, drápsmaðurin, hevði sæð meg og nú vildi drepa meg?

Kundi eg yvirhøvur kenna meg trygga?

Tað fór eg helst ikke at finna útav...

Eg fór helst ongantíð at kenna meg trygga aftur...

*Annika.H.Wandall 7.b Tórshavnar kommuniskúli Tlf. 321986*